# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-135_1.2
dags. 09-02-2011

**Fíggjarmálaráðið**

fmr fmr.fo

***Viðv.: Tygara mál nr. 3360-0004/2011/ 2 um uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tinglýsingargjøld***

Felagið hevur móttikið uppskotið 24-01-2011 og er hettar viðgjørt á stýrisfundi 08-02-2011.

Við uppskotinum verður partur av fíggingini av tinglýsing fluttur til kommunurnar at gjalda, sum brúkaragjald. Tí er tað ikki rætt, sum viðmerkt er í uppskotinum, at broytingarnar ikki ávirka kommunurnar fíggjarliga.

Kommunurnar brúka upplýsingar frá Tinglýsingini dagliga og kemur hettar tí at hava avleiðingar fíggjarliga fyri kommunurnar, um gjaldast skal fyri upplýsingarnar.

Samstundis sum gjaldast skal fyri tænastuna frá Tinglýsingini, hava brúkarar ikki møguleika at fáa somu tænastuna/ upplýsingarnar aðrastaðni. Talan er við øðrum orðum um eitt alment monopol, sum einsíðugt ásetir takstir fyri tænastur, sum ikki verða kappingarútsettar.

Ein slík tænasta, har brúkarin skal gjalda, eigur at loysast á mest effektiva hátt og verða so bílig sum gjørligt.

Felagið vil, í hesum sambandi, heita á FMR um at grundgeva fyri, hvussu takstirnir fyri tænasturnar eru ásettir.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður. Bergmann Finnsson, ráðgevi.